# Útboð av rakstri av starvsfólkamatstovu hjá Kringvarpi Føroya

## 1 Lýsing

Kringvarp Føroya húsast á Norðara Ringvegi 20 í Havn, og í hølunum starvast umleið 80 fólk í føstum starvi. Væntandi verða umleið 50 fólk limir í matarskipanini.

Í matstovuni skal borðreiðast við fjølbroyttum og heilsugóðum mati fyri ein sámiligan prís. Dentur skal vera lagdur á lættari máltíðir, har heitur matur, salat og breyð og ymiskur viðskeri er at fáa.

## 2 Tilboðskrøv

Tilboðið eigur at fevna um mánaðarliga kostnaðin at reka matstovuna, har lagt verður upp fyri, at brúkarar rinda kr. 35 fyri hvørja máltíð (íroknað mvg), ið verður flutt veitaranum.

Ætlanin er, at matstovan skal vera opin mánadag-hósdag.

Veitarin skal tilgera matin í egnum køki. Maturin skal leverast, setast fram og ruddast burtur.

Veitarin skal tryggja mat til umleið 50 fólk teir dagarnar, matur er. Talið kann justerast upp ella niður, eftir at ein royndartíð á tríggjar mánaðir hevur staðfest, hvussu nógv fólk í miðal nýta starvsfólkamatstovuna. Hevur hetta ávirkan á mánaðarliga kostnaðin at reka matstovuna, verður samráðst um nýggja prísáseting.

### 2.1 Skjalprógv fyri førleika

Tilboðsgevari skal skjalprógva, at hann er førur fyri at veita tær tænastur, sum eru kravdar í hesum tilboðstilfarinum.

Royndir og førleikar skulu lýsast. Eisini verður væntað, at tilboðsgevari vísir, hvussu uppgávurnar verða samskipaðar.

### 2.2 Matur

Stórur dentur verður lagdur á matgóðskuna. Maturin skal vera fjølbroyttur og heilsugóður.

Dømi um matskrá fyri tvær vikur skal vera partur av tilboðnum.

Frágreiðing um hvørjar rávørur tilboðsgevari ætlar at nýta skal hjáleggjast.

## 2.3 Tænasta

Veitarin tryggjar, at fólk eru tøk til at skipa so fyri, at nóg mikið av mati altíð stendur frammi, og at góð tænasta verður veitt. Veitarin tryggjar, at maturin stendur klárur kl. 11.30, og at maturin er avruddaður kl. 13.30. Veitarin tryggjar, at køkurin verður hildin reinur og ruddiligur hetta tíðarskeið.

## 2.4 Veitingartrygd

Trygd skal veitast fyri, at tillutaða uppgávan verður framd. Er starvsfólk sjúkt, ella onnur serlig viðurskifti eru, er tað ábyrgdin hjá veitaranum at skipa so fyri, at tænastan verður framd sum væntað.

## 2.5 Køksútgerð

Útgerðin, sum er tøk í køkinum í Kringvarpinum, er í útgangsstøðinum tann útgerð, sum Kringvarpið veitir veitaranum. Eru serlig krøv til køksútgerð, skal hetta viðmerkjast og lýsast í tilboðnum.

## 2.6 Meirveiting

Møguleiki skal vera fyri meirveiting eftir tørvi. Um Kringvarpið til dømis ynskir at bjóða starvsfólkunum døgurða onkran fríggjadag, er veitarin til reiðar til tað við eini tíðarfreist, sum Kringvarpið og veitarin avtala sínámillum. Eykakostnaður í hesum sambandi skal upplýsast.

Harafturat skal veitari kunna bjóða meirveiting eftir tørvi til starvsfólk, sum arbeiða kvøldvakt og vikuskiftisvakt. Dømi um slíka máltíð skal lýsast. Kringvarpið og veitarin avtala tíðarfreist fyri umbøn um meirveitingar.

## 2.7 Tilboðsútrokning

Tilboðið skal útroknast við støði í teimum treytum, ið eru lýstar í útboðstilfarinum. Tilboðið/útrokningin skal innihalda allar útreiðslur, sum standast av útinningini av uppgávuni.

## 3.Treytir o.a.

### 3.1 Prísstøði

Brúkaragjaldið skal vera 35 krónur fyri máltíðina (íroknað mvg). Veitarin kann ikki broyta prísin einsamallur. Skal prísurin broytast, samráðast Kringvarp Føroya og veitarin um hetta. Prísendurskoðan verður gjørd eina ferð um árið. Um prísurin skal broytast í hesum tíðarskeiði, skulu serlig viðurskifti tala fyri hesum.

### 3.2 Matsøluskipan

Matstovunýtslan verður skrásett elektroniskt, so starvsfólkini stempla sína matstovunýtslu á teldu í matstovuni. Keypið verður kravt inn av Gjaldstovuni hvønn mánað, so gjøldini kunnu flytast til veitaran.

### 3.3 Mattíð

Døgurði skal vera tøkur millum kl. 11.30 og 13.30.

### 3.4 Feriur o.a.

Veitarin ger døgurða 4 dagar um vikuna, mánadag til og við hósdag. Tó er eingin døgurði millum jól og nýggjár og 4 vikur í juli/august.

### 3.5 Kundagrundarlag

Væntast kann, at á leið 50 fólk eta í miðal í matstovuni dagliga, men talið av fólki er sjálvsagt tongt at, hvussu nógv starvsfólk eru til arbeiðis. Tí eru dagar, har færri ella fleiri fólk eta. Vanliga ber til hjá Kringvarpinum at boða veitaranum frá, um kundatalið væntast at vera serliga stórt ella lítið ávísan dag.

### 3.6 Matstovugjald

Eitt árligt gjald verður veitt fyri at reka matstovuna. Eftir samráðing við tann tilboðsgevara, sum Kringvarpið metir hevur besta tilboðið, verður gjaldið ásett.

Kostnaðurin kann vera við treytum, men hesar skulu vera greitt lýstar. Tilboðið skal útroknast við støði í teimum treytum, ið eru lýstar í útboðstilfarinum, og fasta gjaldið, sum veitarin skal hava fyri tænastuna, skal upplýsast í tilboðnum. Gjaldið verður goldið

mánaðarliga. Upplýsast skal tí ein mánaðarligur kostnaður fyri at veita tænastuna, tá brúkaragjaldið ikki er íroknað. Inntøkan frá brúkaragjaldinum verður rindað umframt fasta gjaldið.

Kringvarpið tryggjar, at goldið altíð verður fyri 50 máltíðir um dagin, og verður endaliga miðaltalið fyri hvønn dag gjørt upp eina ferð um mánaðin fyri mánaðin frammanundan. Hava færri enn 50 starvsfólk goldið fyri at eta, rindar Kringvarpið munin upp til endaliga talið, 50 í miðal fyri hvønn dagin.

## 4.Tillutan

Eftir at Kringvarpið hevur viðgjørt tilboðini, verða teir bestu tilboðsgevararnir bodnir til samrøðu við støði í tilboðunum. Eftir samrøðurnar fer Kringvarpið í holt við sáttmálasamráðing við tann tilboðsgevara, sum Kringvarpið metir hevur besta tilboðið.

Í síni meting av tilboðum leggur Kringvarpið serligan dent á hesi viðurskifti:

• Tilboð (besti tilboðsprísur)

• Góðska (matur, tænasta, o.s.fr.).

• Veitingartrygd (áhaldandi veiting undir serligum umstøðum, t.d. sjúka, og veiting til kvøld- og vikuskiftisvaktir, kostnað, góðsku o.s.fr.).

Tá metast skal um tilboðini, verða omanfyrinevndu viðurskifti vigað við umleið 50% fyri tilboð/prís, 25% fyri góðsku, 25% fyri veitingartrygd.

## 5.Tilfar

Tilboðstilfar skal sendast til Sissal Carlsdóttir á Lag á scl@kvf.fo.

Kringvarpið tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum tilboði.

## 6.Tíðarætlan

Freistin at lata inn tilboð er: mánadagin 9. mars 2026 kl. 12.00. Spurningar kunnu sendast skrivliga til Sissal Carlsdóttir á Lag á scl@kvf.fo í seinasta lagi mánadagin 2. mars 2026. Miðað verður ímóti at undirskriva sáttmála í seinasta lagi 1. apríl 2026, og at veitingin byrjar sum skjótast eftir undirskrivingina.